HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Veterinerdeildin søkir eftir djóralækna

Vit søkja eftir djóralækna í fast starv sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir um allar uppgávur á Veterinerdeildin, við serligum denti á:

- Skapa og dagføra reglur á veterinerøkinum, tað vil siga reglur sum stuðla undir
  - tryggum, góðum matvørum
  - fóðuri av høgari góðsku
  - djóraheilsu
  - djóravælverð og trivnaði
  - tilbúgvingarskipanir
- Yvirvøku av djórasjúkum, her verður serligur dentur lagdur á aldan fisk
- Luttøku í vaktarskipan fyri almennar veterinerar uppgávur
- Varafólk fyri landsdjóralæknan

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava djóralæknaútbúgving frá einum norðurlendskum háskúla ella djóralæknaútbúgving, sum kann síðustillast, soleiðis at tú kanst gerast løggildur djóralækni í Føroyum. Royndir á økinum og/ella kunnleiki til føroysk viðurskifti er ein fyrimunur.

Harafturat skalt tú:

- Duga at samskifta í skrift og talu norðurlendskum og enskum.
- Arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Duga at fasthalda yvirlitið um hart leikar á
- Hava kunnleika til og royndir við KT
- Hava koyrikort til bil

**Vit bjóða**
Eitt spennandi, avbjóðandi starv sum er fakliga fevnir breitt um veterinerøkið. Viðkomandi og sjálvstøðugt arbeiði á einari deild við dugnaligum og áhugaðum starvsfólkum við góðari útbúgving og hollum royndum. Møguleiki fyri at fáa ávirkan á raðfesting av arbeiðsuppgávunum. Ein stovn, sum hevur stóran samfelagsligan týdning við tøttum sambandi til vinnuna og aðrar myndugleikar. Góðar møguleikar fyri førleikamenning.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarsett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya. Sí www.lnd.fo

**Umsókn til starvið**
Umsókn við CV, avrit av prógvum v.m. skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Falkavegur 6, 100 Tórshavn ella hfs@hfs.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 5. mars 2010.

Nærri fæst at vita um starvið áa www.hfs.fo við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, tlf +298 556 468, e-mail benni@hfs.fo ella Birnu Mørkøre, landsdjóralækna, tlf: +298 556468, e-mail: birnam@hfs.fo .

*Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Endamál stovnsins er at umsita matvørulógina og djórasjúkulógina.*

*Veterinerdeildin hevur síðani 2008 verið ein stápsfunktión av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Deildin er leidd av landsdjóralæknanum og er harafturat normerað við tveimum ársverkum. Deildin hevur fyrst og fremst til uppgávu at dagføra veterineru reglurnar; hetta í tøttum samstarvi við restina av stovninum.*

*Veterineravtalan við Føroyar ásetur at Føroyar skulu hava somu rættarreglur sum ES fyri at tryggja góðskuna á matvørum og fóðuri og tryggja góðari djóraheilsu og trivnaði. Hetta loyvir Føroyum at útflyta fisk og fiskaúrdráttir uttan marknaðeftirlit til ES. Somuleiðis kann ES innflyta allar vørur av djórauppruna til Føroyar.*
*Innflutningur av mati og fóðuri úr 3. londum skal umvegis marknað eftirlitsstøð ("BIP").*

*Harafturat eru veterinerar avtalur við Russland, Føroyar og Ísland.*